--- endurlýsing ---

## VENJINGARSKÚLIN

### Fyribilsstarv sum varaskúlastjóri

Í sambandi við at varaskúlastjórin fer í farloyvi, verður starvið sum varaskúlastjóri í Venjingarskúlanum lýst leyst til setanar í tíðarskeiðnum **1. august 2008 til 31. juli 2009**.

**Søkt verður eftir varaskúlastjóra, sum**
- undir ábyrgd og í samstarvi við skúlastjóran skal taka lut í fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluni í skúlanum
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg uppgávur í samstarvi við og eftir fyriskipan skúlastjórans.

**Harumframt skal varaskúlastjórin**
- vera næsti medarbeiðari skúlastjórans
- saman við skúlastjóranum átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava læraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við fyribilstænastu í Venjingarskúlanum. Tann, ið sett/-ur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið verður lønt í lønarflokki 34.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann, sum sett/-ur verður, er tænastumaður frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir** við ljósriti av prógvum og CV og møguligum viðmælum skulu verða sendar skúlanum. Freistin at søkja er **19. mai 2008 á middegi.** Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Petur Ova Petersen, skúlastjóra á telefon 213502 ella 301529.

*Í Venjingarskúlanum verða komandi skúlaár umleið 440 næmingar í 19 flokkum, og her koma at starvast 45 fólk. Lærararnir eru skipaðir í 5 sjálvstýrandi toymi : 1.-3. fl., 4. og 5. fl., 6. og 7. fl., 8.-10. fl. og sertoymi. Skúlin húsast í trimum bygningum : 1. og 2. flokkur halda til á Ytra skúla við Landavegin, 3. fl. á Heimara skúla við Fr. Petersens gøtu og 4.-10. fl. eru í skúlanum á Stórheyggi.*

**Venjingarskúlin**
handan Á 14

---

## Havnar Arbeiðskvinnufelag

Aðalfundur felagsins, ið varð lýstur at verða 3. mai verður ístaðin 17. mai kl. 15.00 á Hotel Hafnia.

Skrá sambart lógum felagsins

**Nevndin**

---

Eiðis kommuna

## Námsfrøðingar til barnagarðin á Eiði

Til nýggja barnagarðin á Eiði, sum eftir ætlan verður tikin í nýtslu eftir summarfrítíðina, verður søkt eftir námsfrøðingum at starvast 28 - 40 tímar um vikuna.

Størvini verða sett 11.08.2008 (ella eftir avtalu)

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Barnagarðurin hevur pláss til 66 børn í aldrinum 0 til 9 ár.

**Krøvini til tín eru:**
- At tú ert fyrikomandi og erligur
- At tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ábyrgdarfult
- At tú heldur at arbeiði á einum barnagarði er spennandi og avbjóðandi
- At tú dugir at síggja avbjóðingar fram um avmarkingar
- At tú ert nærverandi og dugir at lurta
- At tú raðfestir foreldrasamstarv høgt
- At tú hevur góðan samstarvsførleika
- At tú vil verða við til at menna stovnin og arbeiða við tí vit seta okkum sum mál

Vit bjóða eitt áhugavert og spennandi starv, har tú frá byrjan av sleppur at verða við til at mynda títt dagliga arbeiði og skapa ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag saman við børnunum.

Meira fæst at vita hjá leiðaranum Dorit Kruse Jacobsen á tlf 210588

Skrivlig umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmæli skal verða okkum í hendi seinast 17.05.2008, kl. 12.00

Brævbjálvin skal merkjast "umsókn til barnagarðin" og sendast til

Eiðis kommuna
Brekkuvegur 22
470 Eiði

---

## FERIUAVLOYSARI

Sóknast verður eftir feriuavloysara skjótast gjørligt 4 mánaðir.

Viðkomandi má hava kunnleika arbeiði í klædnahandli.

Skálabúðin
Dr. Jakobsensgøta 21 - Tel 315315

---

## Rørsmiður ella handverkari

Søkt verður eftir rørsmiði / handverkara at byrja so skjott sum gjørligt.

Vit leggja dent á, at tú ert raskur, álítandi og nærlagdur.

Nærri fæst at vita á telefon 228180

rør-tænastan
Vatn•Hiti•Sanitet•Ventilatión

---

zarepta

### Lega fyri støk á Zarepta

Legan er fyri øll støk, 30 ár og eldri.
Legan byrjar fríggjakvøldið 23. mai kl. 19. og heldur fram til eftir døgurða sunnudagin 25. mai.

**Evnið verður**
Virðið okkara í Kristusi.

Tilmelding fer fram við at ringja til Eydnu Berg, tlf. 219651 ella 609651 (heima)

*Sí www.zarepta.fo*

---

## BÍLIG JARN
### KONSTRUKTIÓN

**177 m2 við tilhoyrandi undirsløgum og tilhoyrandi takkonstruktión**

**Kann møguliga nýtast til neyst ella bilhús**

P/f Jógvan Weihe
Heil- og smásøla

**RING 55 38 97**

---

## Hús til sølu

Hús í Vestmanna til sølu, Garðavegur 5 og Garðavegur 7.
Grundstykkið við jarðarstykki (2260 m$^2$) uttanvert Hórðará.
Jarðarstykki inni á Leiti.
Neyst út í Bakka.

Til sølu um hóskandi boð fæst
**Tlf. 27 31 17**